Fólkaheilsa og heilsufremjandi tiltøk fyri børn og ung

# Heilsan hjá børnum raðfestast høgt

**Landsstýrismaðurin í heislumálum ynskir, at tiltøkini viðvíkjandi fólkaheilsu og heilsufremjan verða málrættaði. Tí bjóðaði hann mánamorgunin til fundar í veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum um hetta sera týðandi evni. Í fyrstu syftu verður fokus sett á børn og ung í skúlaaldri**

FYRIBYRGINGARFUNDUR
*Rúna Sivertsen*

Landsstýrismaðurin byrjaði fundin við at siga, at hansara fatan er, at fyribyrging í sær sjálvum er kríggj.

- Tað er sum at fara í hernað móti skeivum heilsuatburði og

atburði yvirhøvur, segði Bill Justinussen, tá hann beyð øllum at vera hjartaliga vælkomnum til fundin um fyribyrging.

Ætlanin við fundinum var í fyrsta lagi at geva landsstýrismanninum íblástur til eina fyribyrgingarætlan fyri Føroyar. Økini, sum familju- og heilsumálaráðið heldur hava størstan skund, eru: Kostur, rørsla, harðskapur og rúsevnir.

Við hesum fyri eyga, hevði Bill bjóðað Fyribyrgingarráðnum, Ítróttarsambandi Føroya, Økonomfelag Føroya, Tollvaldinum og Løgregluni at hava framløgur fyri politikarum, heilsustarvsfólki, fráhaldsfeløgum, kirkjum og samkomum.

Rúsdrekkasøla Landsins og bryggjaríini vóru eisini umboðaði á fundinum, saman við pedagogum og øðrum sum hava tilknýti til børn og ung.

## Rúsevnini floyma

Regin Jørgensen, sum burturav arbeiðir við narkomálum hjá løgregluni, helt fyrilestur um rúsevnismisnýtslu.

- Rúsevnini floyma inn yvir okkum, segði Regin.

Hann legði dent á, at hash, sum av summum verður sagt at vera meinaleyst, er eitt sera vandamikið evnið.

Regin helt ein serstakliga viðkomandi fyrilestur, har hann vísti á, at rúsevnistrupulleikar ofta kunnu førast heilt aftur til tíðina, tá eitt barn varð gitið í móðurlívi.

Hann segði m.a., at fyrst, eitt barn er gitið, byrja foreldrini at hugsa um, hvussu tey skulu sleppa av við barnið. Við tí sipaði hann til lívsmynstrið, vit hava í dag við stóru krøvunum, sum gera tað neyðugt hjá báðum foreldrum at arbeiða. Tað ger, at spurningurin, hvør skal ansa barninum, tá tað er komið til verðina, heldur er ein trupulleiki enn ein sjálvfylgja.

Tað er umráðandi fyri børn at verða lagrað positivt heilt frá byrjan av, legði løgreglumaðurin áherðlsu á.

## Góðir fyrilestrar

Hini, sum hildu fyrilestrar vóru, Jenny Lydersen fyri Fyribyrgingarráðið, Sølvi Reinert Hansen fyri ÍSF, Bente Kjær fyri Økonomfelagið, Kjartan D. Joensen fyri Tollvaldið. Og fyri løgregluna helt Jens Jensen, eisini fyrilestur um arbeiðið hjá løgregluni í samband við rúsevnir.

Vit fara í komandi bløðum at viðgera nakað av tí, sum kom fram á fundinum.





*Hash er eitt vandamikið evni, sum í allarflestu førum førir til nýtslu av enn sterkari rúsevnum, sigur Regin Jørgensen, løgreglumaður, sum burturav arbeiðir við narkomálum hjá løgregluni*
*Mynd: Rúna Sivertsen*



*Eftir fundin fingu fólk høvi at síggja og lukta rúsevnini, sum løgreglumennirnir høvdu við sær. Í kassanum lógu pípur og onnur amboð, ið nýtt verða til rús av ymiskum slag*
*Mynd: Rúna Sivertsen*




